DEKKMASTER.FO

GIANTCO

# Skutari SERTILBOÐ




**Fæst í litunum:**
- Bláur/svartur
- Reyður/svartur
- Gulur/svartur

**Giantco Sprint** er ein nútímans skutari við øllum hentleikum.

**Ein kvalitets-skutari fyri lágprís!**

**Skutarin hevur m.a.**
- 4-takts motor
- Polerað bremsugreb
- 12" alufelgur v/pol. kanti
- Hvít blunkljós
- Bagagurúm

Íroknað prísin er skráseting, plátur og mvg

SERTILBOÐ **9.990,-**

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

# Koyri-kort?

Teoriskeið
til persónbil
byrjar
**týsdagin**
**19. august**
**kl. 17.00**

Teoriskeið
til motorsúkklu
byrjar
**týsdagin**
**19. august**
**kl. 17.00**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Rúni Christiansen**
**tel 21 47 65**
**John A. Christiansen**
**tel 21 47 75**

Jekaragøta 10 • Tórshavn

# Rudding

Sørvágs kommuna fer nú at rudda allar almennar vegir og øki í kommununi.

Bilar, bátar, amboð og annað, sum ikki hevur frámerki, ið sigur, hvør eigarin er, verður beint burtur.

Øll, sum hava slíkt órudd standandi á almennum øki, verða biðin um at beina tað burtur í seinasta lagi 22. august 2008. Órudd, sum ikki er burturbeint innan henda dag, fer kommunan at beina burtur. Kommunan tilskilar sær rætt at krevja úrteiðslunar av burturbeiningini endurgoldnar frá eigaranum. Samstundis heitir kommuna vinarliga á øll, sum hava bilvrak ella annað órudd standandi á egnum øki, um at beina hetta burtur. Kommunan vil fegin leiðbeina nærri um hetta.

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 363200 / 363206

# KIOSK ACTIV

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir **VASKIFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø og Kiosk Activ í J. Broncks gøtu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 40.

Søkt verður eisini eftir **KRAMBAFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø, Kiosk Activ í J. Broncks gøtu og Kiosk Activ í Steinatúni at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 41.

# Stuðul til Barnagarðin Eikilund í Vági og til Frítíðarskúlan í Vági

(Endurlýsing)

Søkt verður eftir einum stuðli í tíðarmarkað starv til tvey børn í vøggustovualdri til Barnagarðin Eikilund í Vági frá 11. august 2008 til 1. juli 2009. Arbeiðið er 30 tímar um vikuna.

Somuleiðis verður søkt eftir einum stuðli í tíðarmarkað starv til Frítíðarskúlan í Vági til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi frá 18. august 2008 til 1. juli 2009. Arbeiðið er 20 tímar um vikuna.

Arbeiðið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

Stuðulin kemur í samstarvi við aðrar stuðlar og starvsfólk á stovninum og onnur fakfólk at stuðla børnunum at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag, umframt at kunna viðvirka í teimum tiltøkum, ið liggja uttan fyri stovnin.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara á tlf. 37 36 04 ella 22 67 04.

Umsóknin við prógvum, royndum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 18. august 2008 kl.15.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 · 950 Porkeri
Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo




# Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**




# Arbeiðsfólk

Pizza 67 í Tórshavn søkir arbeiðsfólk at arbeiða í skiftandi vaktum.

**Vit ynskja at tú:**
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni

Løn sambart avtalu.

Ynskir tú at frætta meira um starvið, so er tú vælkomin at ringja 586767 og tosað við Rana.

**Pizza 67**

# Stongt vegna umvæling

Vegna umvæling verður ikki opið aftur fyrrenn 1. september 2008.

**Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi**

# Íbúð ynskist í Klaksvík

18 ára gomul genta, sum skal á HF í Kambsdali í summar, ynskir íbúð.

Fari væl um og gjaldi til tíðina.

**Dagunn Brend, tlf. 262267**

# Kettlingur

Um tað er nakar, ið hevur mist ein kettling burtur – hann er svartur, hvítur um labbarnar og hvítur um bringuna – kann hann avheintast við at ringja 58 83 57.